

## Kaj Leo nýggjur løgmaður

**Javni dysturin millum Kaj Leo Johannesen, Jørgen Niclasen og Jóannes Eidesgaard um løgmansembætið endaði við, at fyrrverandi landsliðsmálmaðurin dró longsta stráið.**

**Kaj Leo Johannesen endaði sum stóri sigursharrin, tá løgmaður skuldi finnast til nýggju ABC-samgonguna.**

**Kaj Leo Johannesen segði, at tað var eitt stórt álit at fáa at gerast løgmaður, og Kaj Leo segði, at hann ætlaði sær at verða løgmaður fyri allar føroyingar**



# Lásagøla gjørdi enda á CHE-samgonguni

**Tað var eitt rættiliga sermerkt stríð um eina skrivstovu í Tinganes, sum umsíðir gjørdi enda á illa sperdu CHE-samgonguni**

Mánadagin 15. september var rysti politiski grundvøllurin í Føroyum enn einaferð. Ikki tí, føroyingar eru vanir við hart politiskt stríð, og CHE-samgongan hevði sanniliga havt síni mál at berjast við. Ósemjur um tunlar, fiskidagar og annað hevði mest sum givið samgonguni strongd, áðrenn hon rættiliga var komin fyri seg.

Og so endaði alt mitt í tí heila.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður steig fram við álvarsomum andliti og boðaði frá, at samstarvið við Tjóðveldi varð sagt upp.

– Afturvendandi orrusturnar hava máðað støðið undan samgongusamstarvinum og trúnni hjá mær og mínum flokki á, at vit kunnu møta teimum stóru avbjóðingunum, ið okkara samfelag stendur framman fyri, segði Jóannes Eidesgaard.

– Hendingarnar seinastu dagarnar, har roynt hevur verið at undirgrava myndugleikan hjá mær sum løgmanni, hava nú endaliga staðfest, at onki álit er ímillum leiðararnar í Javnaðarflokkinum og Tjóðveldi. Tað er púrasta burtur, segði løgmaður og sipaði til stríðið um eina skrivstovu í Tinganes, har lás vórður skift, og bæði politikarar og embætisfólk klandraðust.

### Tordi ikki meira

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi skilti als ikki Javnaðarflokkin, og hann vísti avgjørdur aftur, at hann skuldi havt gjørt seg inn á nakra skrivstovu í Tinganesi. Skuldsetingar vóru í luftini millum teir báðar floksformenninar, og almenningurin hevði ilt við at skilja málið heilt.

– Veruliga orsøkin til uppsøgnina, er, at løgmaður ikki torir at standa við ábyrgdini longur, og tí skal finna onkra umbering fyri at sleppa undan. Hetta er ein umbering hjá løgmanni fyri at sleppa undan eini støðu, sum hann ikki vil vera í longur, segði Høgni Hoydal.

Triði flokkurin í samgonguni, Miðflokkurin, fanst eisini at løgmanni.

– Tað boðar ikki frá politiskum stabiliteti, at Javnaðarflokkurin nú fer aftur til teir flokkar, sum hann vrakaði fyrst í árinum. Eg haldi, at Javnaðarflokkurin hevur kastað alt trúvirðið fyri borð, nú teir rekast úr einari koyggju í aðra, segði Jenis av Rana.

**» – Eg ynski altíð, at konan er við til fyrstu samrøðuna, tí tá ið ein sjúklingur fær at vita, at hann hevur krabbamein, hoyrir hann ikki meira enn tey fyrstu 10 sekundini.**

Johan Poulsen, yvirlækni, um krabbamein hjá monnum

**» Mín rættvísiskensla sigur mær, at brotsverk ímóti børnum eigur at verða harðari revsað enn til dømis fíggjarlig brotsverk.**

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna

## Aldarinnar brúdleyp

Tá Mamy Dahl Sørensen av Viðareiði og Hákun Egilsnes úr Vestmanna valdu at gifta seg, høvdu tey ikki ímyndað sær, at áhugin fyri teirra brúdleypi skuldi gerast so stórur, sum hann gjørdist.

– Hvør skuldi trúð at so nógv verður gjørt burtur úr, og at tað skuldu koma 700 gestir í okkara brúdleyp, sigur brúðgómurin.

Vígslan var á Viðareiði, og veitslan var í Vestmanna.

## Óluva reyk beinanvegin



**Hon fekk ikki meiri enn tvær vikur í illa gitna mentamálaráðharrastólinum, so var CHE-samgongan fokin, og Óluva Klettskarð mátti fara úr stólinum aftur.**

**- Ikki tí, stólurin var fínur at sita í, men tíðin gjørdist so stutt, at eg ikki rættiliga fekk sett meg inn í øll málini, sigur Óluva Klettskarð.**

**- Eg má viðganga, at tað var ikki júst hetta, eg hevði væntað, tá eg játtaði at taka við sum mentamálaráðharri. So man kennir seg ein sindur býttan, tá hetta hendi, sigur hon.**

## Fleiri smuglarar tiknir

Vanliga verða umleið 30 fólk um árið tikin av løgreglu og tollvaldið í samband við smugling av rúsevnum.

Men miðskeiðis í september er talið longu komið upp á 30, og líkt er til, at talan verður um metár.

Ein stórur munur á árinum í ár og undanfarin ár, er at tollvaldið í fjør fekk ein nýggjan hund, sum sambært teimum sjálvum hevur effektiviserað arbeiðið í samband við rúsevni sera nógv. Í dag hevur tollvaldið tveir hundar og løgreglan ein. Hetta eru sokallaðir hassjhundar, men teir lukta eisini onnur rúsevni..

Ein onnur broytin í smuglingini, er at fleiri fólk eru farin at smugla rúsevnir innvortis.